# Takkaðu fyri seg í Klaksvík

**HONDBÓLTUR** Team Klaksvík spældi sín seinasta heimadyst í bestu deildini á hesum sinni. Teir taptu stórt fyri StÍF. Nú manglar bara Neistin á útivølli, áðrenn klaksvíkingar kunnu eftirmeta kappingina

Uni Holm Johannesen

Óroyndu uppflytararnir úr Klaksvík spældi sín seinasta heimadyst í hesum kappingarárinum fríggjakvøldið. Team Klaksvík tapti aftur stórt, hesa ferð fyri StÍF. Úrslitið var 44-20.

### Greiður málsetningur

Team Klaksvík hevur einki havt at spælt fyri í hesum kappingarárinum. Klaksvíkingar vistu frammanundan, at hini liðini vóru nógv betri. Málsetningurin var greiður frá byrjan. Teir eru við fyri at læra. Uppflytararnir vónaðu, men væntaðu ikki, at fáa stig í hesum kappingarárinum. Tað eydnaðist at vinna á H71. Sigurin blásti lív í manshondbóltin í Klaksvík, men tað var skjótt, at klaksvíkingar fingu armarnar niður aftur.

Menningin hevur hinvegin verið stór gjøgnum kappingarárið. Næsta vikuskiftið skal Team Klaksvík á vitjan hjá Neistanum, og tá seta uppflytararnir punktum fyri sínum fyrsta árið í bestu deildini. Tá byrja somuleiðis fyrireikingarnar til næsta kappingarárið, tá klaksvíkingar ætla sær fleiri stig.

*uni@sosialurin.fo*

## VÍF – Kyndil 31-26 (17-13)

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen
Áskoðarar: 200 fólk
**10 min.: 3-3**
**20 min.: 8-8**
**40 min.: 23-18**
**50 min.: 26-20**

**VÍF:** Holgar Durhuus 8, Magnus Muller 6, Áki G. Olsen 5, Bjarti Hansen 4, Rúni Fossdal 3, Sjúrður Poulsen 2, Jákup A. Joensen 2, Andrias Eriksen 1.
**Kyndil:** Bárður Johannesen 9, Hans Áki Dal-Christiansen 5, Karl Jóhan Djurhuus 5, Hans Arni Thomsen 3, Rani Ellingsgaard 2, Rógvi Dal-Christiansen 1, Andrias B. Sólsker 1.
Útvísingar: VÍF 3, Kyndil 5.
Reytt kort: Hans Áki Dal-Christiansen, tríggjar útvísingar

## KÍF – H71 24-23 (13-8)

Dómarar: Dánjal Samuelsen og Heri Petersen
Áskoðarar: 300 fólk
**10 min.: 5-2**
**20 min.: 9-3**
**40 min.: 17-11**
**50 min.: 22-17**

**KÍF:** Rúni Joensen 9, Regin Petersen 4, Tony Weihe 4, Niklas Reginsson 2, Teitur Joensen 1, Ási Dam 1, Agnar Joensen 1.
**H71:** Dánjal Tórgarð 10, Esbern Patursson 3, Hans Kári Hansen 3, Rúni V. Højgaard 2, Bogdan Florea 2, Rógvi Sørensen 1, Bogi Krossteig 1, Ári J. Olsen 1.
Útvísingar: KÍF 12, H71 8.

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 23 | 801 | 643 | 158 | 41 |
| 2 | KÍF | 22 | 621 | 565 | 56 | 30 |
| 3 | VÍF | 23 | 657 | 603 | 54 | 25 |
| 4 | H71 | 23 | 644 | 609 | 35 | 24 |
| 5 | Kyndil | 23 | 595 | 614 | -19 | 21 |
| 6 | StÍF | 23 | 624 | 611 | 13 | 17 |
| 7 | Team Klaksvík | 23 | 541 | 838 | -297 | 2 |




*Loksins kundi kollfirðingar, sum hava verið nummar tvey uttan slit síðani november, staðfesta finaluplássið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nú er KÍF í finaluni

**HONDBÓLTUR** Loksins kundi KÍF, sum hevur verið nummar tvey alt kappingarárið, staðfesta sítt finalupláss. H71 hevur runnið aftaná seinastu vikurnar. Tápuliga tapið fyri Team Klaksvík kostaði dýrt

Uni Holm Johannesen

Team Klaksvík hevur fingið tvey stig í hesum kappingarárinum. Liðið úr Klaksvík hevur havt tað sera trupult. Í 16. umfarinum bragdaði umsíðir hjá klaksvíkingum. Teir vunnu ein dyst í bestu deildini. Tað var á H71, sum vitjaði í Badmintonhøllini í Klaksvík.

Stoltleikin hjá hoyvíkingum var særdur. Liðið, sum hini hava vunnið stórsigur á næstan hvørjaferð, hevði lagt fót fyri teimum. Síðan hevur gingið betri. Fýra sigrar og eitt tap. Góða gongdin hevur havt við sær, at H71 hevði framvegis møguleikan at vinna seg í finalurnar um føroyameistaraheitið undan vitjanini í Kollafirðið í gjár.

Møguleikin var lítið. Hoyvíkingar skuldu vinna sínar dystir, og KÍF skuldu tapa sínar. Tað er eyðsæð, at stigini, sum H71 mistu móti Team Klaksvík, høvdu komið væl við nú. Um smáu líkindini fyri at røkka finalunum var orsøkin til slaka avrikið í gjár, er trupult at siga, men movitatiónin hevði helst verið størri, um bara tvey stig skilti liðini undan dystinum.

### Stóðu seg væl

Hinvegin skal einki takast frá avrikinum hjá kollfirðingum, sum spældu uttan brøðurnar Gert Hansen og Arnbjørn Hansen. Teir spældu við EB/Streymi í steypadystinum móti B36. Kollfirðingar stóðu seg væl í verjupartinum fyrstu løtuna, og 40 ára gamli Óla Kristian Djurhuus, sum vardi málið, hevði fleiri bjargingar. H71 hevði bara fingið tvey mál, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin.

Tá var KÍF fimm mál frammanfyri. Tann munurin helt sær eina løtu. Seinastu minuttirnar av dystinum fóru hoyvíkingar upp í ferð í allar seinastu royndini at røkka finalunum, meðan kollfirðingar tóktust sannførdir um, at tað fór ikki at ganga galið. Tíðin fór frá H71. KÍF vann við einum máli, 24-23.

### Endaliga staðfest

Tað hevur verið ávegis í fleiri vikur, men umsíðir kunnu kollfirðingar breggja sær av, at teir skulu spæla finalurnar um føroyameistaraheitið móti Neistanum. KÍF hevur verið nummar tvey uttan slit síðani november í fjør, uttan at hótta oddaliðið. Hóast tað, kunnu kollfirðingar framvegis vinna føroyameistaraheitið. Treytin er, at teir vinna tvær finalur á einaráðandi neistamonnunum.

*uni@sosialurin.fo*

# Avgerðin fellur í Hoyvík

**HONDBÓLTUR** Við sigrinum á Kyndli vunnu vestmenningar seg upp á triðja plássið á stigatalvuni. Tað er longu nú greitt, at bronsumerkini verða handað í høllini í Hoyvík næsta vikuskiftið

Uni Holm Johannesen

Nú eru bara bronsumerkini eftir at stríðast um hjá hoyvíkingum og vestmenningum. H71 tapti fyri kollfirðingum, og tað hevur við sær, at VÍF liggur best fyri í stríðnum um bronsuheiðursmerki.

Fyrimunin vunnið teir sær í ítróttarhøllini í Vestmanna í gjár. Tað hevur verið lítið veiggj í Kyndli seinastu vikurnar, og kyndilsmenn hóttu heldur ikki VÍF í gjár. Úrslitið var 31-26. Holgar Djurhuus var toppskjútti við átta málum.

### Hans Áki útvístur

Tað var miðskeiðis í fyrra hálvleiki, at VÍF fór frá gestunum. Holgar Djurhuus gekk fremst í álopsspælinum, tá heimaliðið vann sær eina leiðslu á fýra mál. Vestmenningar syrgdu fyri við stinnum verjuspæli, at Kyndil ikki kom nærri eftir steðgin.

Tá sjey minuttir restaðu í av dystinum varð Hans Áki Dal-Christiansen útvístur fyri triðju ferð. Tað hevði ikki stórvegis ávirkan, tí heimaliðið var tá á odda 28-22.

### Bronsumerkini upp á spæl

Næsta vikuskiftið spæla H71 og VÍF sín seinasta dyst í hesum kappingarárinum. Liðini bresta saman í Hoyvíkarhøllini. Vestmenningar hava 25 stig, sum er eitt meira enn hoyvíkingar. Treytirnar eru tískil einfaldar, um H71 ætlar sær bronsumerkini. Kravið er ein sigur.